# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Rúni Nolsøe tosaði við dómaran í hálvleikinum, har hann royndi at leggja trýst á, fyri at vit skuldu fáa kort. Og tað riggaði opinbart*

*Niclas Niclasen, liðformaður hjá Víkingi*



*Helvtin av Formuladeildini er í vanda fyri at flyta niður, og í hesi helvt eru bæði KÍ og B68 at finna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Spenningurin í botni

**Nú 16 umfør eru spæld í Formuladeildini, er spenningurin í botninum ovurhonds stórur, meðan spenningurin í oddinum er í botni, har EB/Streymur er átta stig frammanfyri nærmastu kappingarneytarnar**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

20 stig. Tað plagar at vera nóg mikið til at lívbjarga sær í landsins bestu fótbóltsdeild. Men nú 16 umfør eru spæld og 11 eftir at leika, hava liðini í botninum skavað sær so nógv stig saman, at tað eftir øllum at døma skulu nakað væl meiri enn 20 stig, fyri at tryggja sær sætið í Formuladeildini. Hetta tí, at tey bæði liðini undir niðurflytingarmarkinum longu hava 14 stig. Og við 11 dystum eftir at leika, má tað metast sum ógvuliga ósannlíkt, at Skála og B71 ikki fáa fleiri enn seks stig aftrat.

Hetta merkir samstundis, at trý tey næstu liðini oman fyri strikuna heldur ikki kunnu kenna seg trygg. B68 og KÍ hava 17 stig hvør, meðan uppflytararnir ÍF hava 20 stig. Vert er at hefta seg við, at uppflytararnir báðir eru omanfyri niðurflytingarmarkið, meðan Skála og B71, ið bæði vóru í Formuladeildini í fjør, liggja skeivu megin strikuna.

Somuleiðis er eisini vert at hefta seg við, at einki av teimum fimm liðunum kann kenna tryggan í deildini. Við øðrum orðum er helmingurin av liðunum í landsins bestu fótbóltsdeild í reellum niðurflytingarvanda, nú bara 11 dystir eru eftir at spæla.

## Eitt umfar millum succés og fiasko

Venda vit okkum til hin endan av stigatalvuni, er nógv broytt síðani seinasta leikumfar. 24 dagar eru gingnir síðani feløgini fóru í feriu, men bert eitt leikumfar skilir 13. juli frá 6. august. Nú er EB/Streymur aftur stórfavorittur til at vinna Føroyameistaraheitið. Ein heitið, felagsliðið úr Sundalagnum ongantíð hevur vunnið, hóast teir hava verið nær við tey bæði síðstu árini.

So greiður favorittur var EB/Streymur tó ikki undan dystinum. Liðið hevði tapt tríggjarlandskappingardystir á rað, og fjarstøðan niður til NSÍ var minkað niður í fimm stig.

Omaná tað komu tvey tap í UEFA Cup. Ímóti Manchester City var alt annað óvæntað, men tvey tap aftrat burdu ikki bøtt upp á lagið í hópinum, sum ikki hevur neyðugu royndirnar, tá á stendur. Men í gjárkvøldið stóð á, og tað bragdaði hjá EB/Streymi. Felagið skuldi venda keðiligu gongdini, og hetta ímóti argasta kappingarneytanum um fremsta sessin.

EB/Streymur stóð royndina. Eftir fimm tap á rað, fekk felagið ein kærkomnan sigur.

At úrslitini so eisini lagaðu seg soleiðis, at øll tey nærmastu liðini, uttan B36, mistu stig, ger støðuna bara upp aftur betri. Eitt umfar var munurin millum succés og fiasko!

Eitt annað, sum eisini kom væl við hjá EB/Streymi var, at tað vóru Arnbjørn Hansen og Hans Pauli Samuelsen, ið gjørdu málini. Hesir báðir eru hornasteinar í framrættaða spælinum hjá EB/Streymi, og tí er týdningarmikið hjá EB/Streymi, at hesir koma væl frá byrjan.

## Óeydnu danir

Stuttligt er eisini at býta merki í, at hvørki Peter Foldgast ella Anders Post Jacobsen byrjaðu inni hjá EB/Streymi í gjár. Tað er fyrst ferðin, at tað kemur fyri síðani teir vórðu knýttir at felagnum, og liðið hevur tapt allar dystirnar síðani. Í gjár var hvørgin teirra millum teir fyrstu 11, og liðið sigraði endiliga aftur. Harvið er ikki sagt, at tað er ein samanhangur millum ósigrar og danir í EB/Streymi, men atfinningarsomu røddirnar mótvegis Peter Foldgast og Anders Post Jacobsen hava fingið enn meiri at prátað um eftir hetta.

## Fimm sentimetrar

Var tað eitt umfar, ið var munurin á succés og fiasko hjá EB/Streymi, so var tað fimm sentimetrar hjá Víkingi og HB. Andreas Lava Olsen sendi eitt skot á tvørtræið, sum brast niður í vøllin, fimm sentimetrar skeivu megin málstrikuna. Nøkur fá sekundir seinni lá bólturin í málinum í hinum endanum. Vagnur Mohr Mortensen tryggjaði ikki liðið sínum succés, men eitt stig í einum dysti, ið lættliga kundi verið taptur.

Hinvegin vóru tað fimm sentimetrar, sum broyttu úrslitið hjá Víkingi í gjár frá at vera ein succés til eina fiasko. Í onkrum øðrum dysti var tað dómarin, ið skuldi eitast at vera ein fiasko, og harvið eisini beinleiðis orsøkin til fiaskoina hjá einum liði.

## Bersøgin liðformaður

16. leikumfar er nú av. Men dysturin millum HB og Víking eigur ikki at vera mettur sum liðugur í enn. Dysturin er sjálvandi liðugur og úrslitið verður verandi javnleikur 1-1. Men eftir útsagnirnar hjá liðformanninum í Víkingi, Niclas Niclasen, í sendingini 3. hálvleikur á Rás2 í gjárkvøldið, sum eisini eru prentaðar í blaðnum í dag, skal roknast við, at tað kemur eitt ávíst eftirspæl.

Fyrr í ár varð Bartal Eliasen revsaður fyri at siga sína hjartans meining um Rúna Gaardbo, og útsagnirnar hjá Niclas Niclasen um Dagfinn Olsen standa lítið aftanfyri tað, ið Bartal Eliasen segði og fekk tveir daga leikbann fyri.